


**BETRI PLÁSS TIL BILAR**

*Nú skulu fleiri parkeringspláss gerast í miðbýnum í Havnini og tað skal arbeiðast skjótt, sigur borgarstjórin, Heðin Mortensen*

# 100 nýggj parkeringspláss gerast í hjartanum í Havn

**PARKERING** Tórshavnar Býráð hevur nú av álvara sett hol á arbeiðið at útvega nýggj parkeringspláss í miðbýnum í Havn

Áki Bertholdsen

Gongst sum ætlað, verða eini 100 nýggj parkeringspláss gjørd í miðbýnum í Havnini.

Tað sæst í eini ætlan, sum í hesum døgum er til viðgerðar í Tórshavnar Býráði fyri at bøta um parkeringsviðurskiftini í miðbýnum.

Fólk hava leingi illneitast inn á tey vánaligu parkeringsviðurskiftini í miðbýnum í Havn.

Og hesi seinastu tíðina hevur gongdin verið tann, at heldur enn at útvega fleiri parkeringspláss í miðbýnum, hevur býráðið tikið burtur av teimum fáu plássunum, sum eru, so at parkeringsplássini eru blivin færri og færri, heldur enn fleiri og fleiri.

## Tá ísbreytin varð sett upp, máttu 20 bilar sleipast burtur

Hinvegin hevur mangan verið víst á, at bilførarar skulu parkera uttanfyri býin og so koyra ímillum miðbý og bil í Bussleiðini, sum er ókeypis.

Men boðskapurin slær ikki ordiliga ígjøgnum og støðan er nú tann, at bæði politikarar og handilsfólk hava stúrt fyri trivnaðinum og handilslívinum í miðbýnum, verður ikki bøtt munandi um parkeringsviðurskiftini í miðbýnum.

– Miðbýurin er alt ov deydligur, fyri ikki at siga steindeyður, halda nógvir politikarar.

### 100 nýggj P-pláss

Og nú ætlar Tórshavnar Býráð sær av álvara at seta skjøtul á arbeiðið at bøta um parkeringsviðurskiftini og sostatt eisini um trivnaðin.

Enn er ongin avgerð tikin, men umsitingin hevur verið runt um í miðbýnum og kanna eftir, hvussu fleiri parkeringspláss kunnu útvegast, varð upplýst á seinasta býráðsfundi í Havn.

Og fyribils er niðurstøðan, at tað ber væl til at útvega nýggj 57 parkeringspláss í miðbýnum, uttan at órógva ferðsluna og uttan at byggja nakað serligt út.

Ein máti at gera tað upp á, er at loyva parkering í ovara borði í Havnargøtu, sum er ivaleysa breið til tað og annars er pláss fyri fleiri nýggjum parkeringsplássum á Bursatanga.

## Tað hevur verið ein stórur trupulleiki, at parkeringsplássið á Skálatrøð hevur verið brúkt til langtíðarparkering

Parkeringsøkið við Perluna í Tórsgøtu, sum varð tikið fyri nøkrum mánaðum síðani, verður latið upp aftur og annars sæst í talvuni, hvar tað ber til at skipa nýggj parkeringsøki.

Hetta verða alt parkeringspláss við tíðaravmarking, har grundreglan verður, at tess nærri miðbýnum, talan er um, tess styttri verður loyvi at parkera, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

### Eisini skúlaløðini

Men harumframt verður eisini umhugsað at lata skúlaløðið í Kommunuskúlanum og Sankta Frans Skúla upp eftir skúlatíð, so at tey kunnu brúkast til parkeringspláss seinnapartar, um kvøldið, um náttina og annars, tá ið eingin skúlagongd er.

Á skúlaløðnum við Kommunuskúlan verður pláss fyri 16 bilum og verða allar hesar ætlanirnar til veruleika, verða tað tætt við 100 nýggj parkeringspláss í miðbýnum í Havnini um stutta tíð.

Spurningurin skal fyrst viðgerðast í umsitingini í býráðnum og í avvarðandi býráðsnevndum, áðrenn tað verður lagt fyri Býráðið, sum so tekur eina endaliga avgerð.

aki@sosialurin.fo

| Stað | P-pláss | Avmarking |
|---|---|---|
| Perlan | 5 | 1 tími |
| Bursatangi | 16 | 2 tímar |
| Havnargøta | 29 | 2 tímar |
| Tórsgøta | 5 | 1 tími |
| Undir Glasheyggi | 2 | 2 tímar |
| Tilsamans: | 57 P-pláss | |

*Hendan talvan vísir, hvar í Havnini, ætlanin er at gera nýggj parkeringspláss. Tilsamans er talan um 57 nýggj parkeringspláss, men enn er endalig avgerð ikki tikin*

| Stað | P-Pláss | Avmarking |
|---|---|---|
| Vørðslan | 12 | - |
| Við Skansastovu | 13 | 2 tímar |
| Bakkahella | 5 | 2 tímar |
| Tinghúsvegur | 4 | 2 tímar |
| Tungugøta/Kongagøta | 12 | 2 tímar |
| Tilsamans | 46 P-pláss | |

*Hendan talvan vísir ymisk støð í Havnini, har bilvar vanliga verða parkeraðir, uttan at básar er máladir í vegin. Her ætlar býráðið at gera parkeringsbásar fyri at parkeringin skal verða betri skipað. Mett verður, at talan kann verða um 46 parkeringspláss á hesum plássum.*